Á Dr2 í kvøld kl. 20.50

# Clement direkte

Í kvøld hevur danska talkshowið "Clement direkte" frumsýning á Dr2. Hyggjarar fáa høvið at síggja eina danska undirhaldssending, ið er sett saman eftir amerikonskum leisti. Ætlanin er at gera eina provokerandi, djarva og eisini mentaða sending, siga tey á DR. Harumframt vendir sendingin sær út eftir, til altjóða heimin, soleiðis at gestir eisini uttanfyri Danmark støkka inn á gólvið. Verturin Clement Kjersgaard fer at tosa við kendar politikkarar og kend fólk úr undirhaldsheiminum, sum á einhvønn hátt hava gjørt vart við seg í vikuni, ið fór. Eisini "tey æviga kendu" sleppa at tosa við Clement. Ymisk listafólk, úr Danmark og eisini uttanfyri Danmark, koma forbí hjá Clement. Tá verður prátað um aktuellar útgávur og frumsýningar av filmi, tónleiki, sjónleiki o.s.v.. Av komandi gestum kunnu nevnast: Pia Kjærsgaard, Peter Brixtofte, Helena Christensen, Lise Nørgaard, Kasper Winding, Klaus Rifbjerg og Henrik Qvortrup. Tónleikagestir uttan úr heimi eru m.a. Gavin De Graw, Robyn og Katie Melua. Ein afturvendandi táttur er innsløg frá Clementsa trúgva, starvsfelaga, Huxi. Hann fylgir við tí, sum fer fram aftanfyri politiska leikpallin. Eisini fer hann til tíðindafundir, ið hava verið í vikuni - hann virkar sum frásøgumaður og altíð leggur hann sín heilt serliga dám á innsløgini. Eisini er "celeb-on-celeb" ein afturvendandi táttur. Her er tað kend, ið gera samrøður við onnur kend fólk. Gjarna er tað heimsstjørnur, ið vitja Danmark og sum ikki hava møguleika at koma inn í sjónvarpsstovuna, so verður ein ella annar navnframur dani sendur út. Sigast kann um vertin Clement B. Kjersgaard, at hann er kendur frá virðisløntu samrøðusendingini "Tal med Gud", "Deadline" og samrøðuni við Desmond Tutu.



*Ætlanin hjá Clement & Co. er at gera eina provokerandi, men eisini, seriøsa sending - tey ætlað at seta trýst á tað kurteisliga markið*

# 8 Mile

Á Kanal 5 mánakvøldið kl. 20.00

**Amerikanskur spenningsfilmur frá 2002**
**Við - Eminem: Jimmy "B-Rabbit" Smith Jr.. Kim Basinger: Stephanie Smith. Mekhi Phifer: David "Future" Porter. Brittany Murphy: Alex.**
**Leikstjórn: Curtis Hanson**



*Rabbit stríðist í einum fátæksligum umhvørvi. Styrki hansara liggur í kjaftinum. Við íblástri úr rapptónleiki festir hann orð á sínar dreymir og sína vreiði*



*Tónleikastjørnan, rapparin Eminem og Brittany Murphy í "8 Mile"*

Søgan í hesum filminum fer fram í 1995 í einum troystarleysum ídnaðarøki í Detroit. Jimmy "B-Rabbit" Smith Jr. hongur út saman við sínum svørtu vinmonnum á gøtunum í fátækasta býarpartinum í Detroit. Rabbit er kringur til at rappa og hevur so avgjørt orðið í síni makt. Við íblástri úr rapptónleiki festir hann orð á dreymar og eisini sína vreiði, og hann kann væl sláa frá sær, um tað so er munnliga ella kroppsliga. Men kortini dámar honum einki at framføra fyri fólki. Rabbit býr saman við mammu síni, Stephanie, og yngru systrini Lily í einum gomlum húsvogni. Mamman hevur rúsdrekkatrupulleikar og tekur sær næstan ikki av børnunum. Rabbit arbeiðir á eini fabrikk, og hóast arbeiðið er keðiligt og illa lønt, so vil hann heldur hava eitt arbeiði, enn einki arbeiði at hava. Besti vinur hansara, Future, samskipar sokallaðar "battles", ella hólmgongum, har rapparar fara illa við hvørjum øðrum og svína hvønn annan til - alt hetta gongur fyri seg munnliga, og teir fáa 45 sekundir í part. Um ein vinnur í hesum hólmgongunum, so vinnur ein virðing og ans úti á gøtunum - og kanska fer hin vakra gentan, Alex, at fáa eyguni upp fyri honum. Hann noyðist at vinna á síni egnu ræðslu fyri at framføra fyri fólki - somuleiðis er tað ein forðing, at hann er einsamallur hvítur í einum svørtum umhvørvi.